

Ben Arabo á framløguni í Oslo í morgun. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroelum heldur kósina

**Jógvan Hugo Gardar**

29.08.2014 - 17:51

Oljan.fo

Atlantic Petroleum hevur í dag almannakunngjørt roknskapartølini fyri annan ársfjóðring í ár. Ben Arabo, stjóri, sigur at teir eru hampuliga nøgdir, og at metingarnar sum teir hava fyri 2014 síggja út til at halda.

Fyrra hálvár gav eitt nettoundirskot uppá 36 milliónir krónur, samanborið við eitt undirskot uppá 2,5 milliónir krónur sama tíðarskeið í 2013.

- Framleiðslan er sum vit høvdu rokna við, meðan oljuprísurin á tí vit hava framleitt hevur verið eitt sindur hægri, sigur hann við oljan.fo.

Framleiðslan í fyrru hálvu av 2014 var 1.762 tunnur um dagin, og úrslitið áðrenn rentur, skatt og avskrivingar (EBITDAX) var 81,2 milliónir krónur. Metta freimleiðslan og EBITDAX fyri 2014 eru óbroytt.

Rakstrarvinningurin í fyrru hálvu av 2014 var 62,4 milliónir krónur, sammet við 90,8 milliónir krónur í fyrru hálvu av 2013. Tap eftir skatt í fyrru hálvu av 2014 var 99,9 milliónir krónur, sammet við eitt tap á 15,0 milliónir krónur í fyrru hálvu av 2013.